

Sjúrður Skaale

# Latið okkum finna eitt gott heiti til Una Arge

*Føroyskt skal víðkast. Vit skulu gera nýggj orð, og taka okkum inn á nýggj øki. Men vit skulu ikki lata málið í stakkalastás*

Eg eri eitt sindur troyttur av at skriva um bókstavir og stavseting, men eg noyðist at geva Una Arge eitt svar.

Hann skrivar í stórari grein leygardagin, at undirritaði: "mælir til málsligt bakstrev og hugsar lítið um, hvussu stóra ørkymlan hansara uppskot um fremmandar stavir og danska og enska stavseting kunnu elva til."

Orsøkin er, at eg havi gjørt eftir áheitanini frá Skúlabókagrunninum, og sagt mína hugsan um eitt nýtt heimsatlas.

Tað hevur Uni eisini gjørt. Eg eri samdur í hansara kritikki, men mæli eisini til, at grunnurin sleppur hesi merkiligu hugsanini um, at vit ikki kunnu nýta t.d. c, x og z í føroyskum. At útihýsa hesum stavum úr alfabetinum er púra meiningsleyst, tí teir liva allir sítt fríska lív í málinum kortini. Ja, fleiri 1000 føroyingar bera teir í sínum egna navni.

At "legalisera" hesar stavir fer ikki á nakran hátt at elva til ørkymlan, sum Uni sigur. Tað fer tvørturímóti at skapa samsvar millum alfabetið og veruleikan.

Tað skapar hinvegin stóra ørkymlan, tá roynt verður at skáksigla uttanum hesar bókstavir, eins og gjørt er í tí á mangan hátt frálíka atlasinum.

Tí føroyingar hava altíð brúkt alt tað latínska alfabetið – og tað gera vit enn. Eisini í landanøvnum. Hyggja vit at farnu viku, so skrivaði portalurin t.d. "31 deyð í ófriði í Jamaica". Eisini stóð "Flogbóltskvinnurnar til Liechtenstein". Og fróðarmaðurin Heini Olsen skrivaði fína grein í Dimmu, har hann m.a. tosaði um "Zanzibar" og "Tanzania". Ein skrivaði um Chile - ein annar um Kili.

Uni sigur, at "Nú tykist hann (SS) við hesum stavunum at vilja broyta føroyskan stavsetingarsið".

Men tað eru ikki tey, sum vilja hava eitt fult alfabet, sum vilja broyta nakað. Tað eru tey, sum vilja halda fast um tað nýggja, amputeraða alfabetið, sum vilja broyta okkara stavsetingarsið.

Hevði onkur góð grundgeving verið fyri hesi amputering, høvdu tey kanska fingið fólk við sær. Men enn hevur eingin dugað at grundgivið fyri hesum.

Tað er fullkomiliga ómøguligt, at halda hesar stavirnar burturi úr málinum. Og tað er fullkomiliga óneyðugt at royna at gera tað. Tí tað gagnar ikki føroyskum. Tað skaðar føroyskt.

### Nógv er at gera

Uni sigur meg eisini vera talsmann fyri, at "føroyski málbúnin er liðugt mentur. Alt er so altjóðagjørt (...), at nú skulu vit bara herma eftir øllum øðrum."

Tað er fyri tað fyrsta ótrúliga løgið at kalla tað at "herma", at skriva Mexico. Harragud – tað er soleiðis landið eitur!

Men annars havi eg aldrin hvørki skrivað, sagt ella hugsað, at málið er liðugt ment.

Á heimasíðuni hjá Málnevndini er ein listi yvir nýggj føroysk orð, sum eru smíðað farnu árini. Listin er langur, tey flestu orðini sita væl og nógv eru fallin natúrliga inn í málið. Nøkur hava málfrøðingar smíðað, men tey bestu hava vanlig fólk ofta funnið uppá.

Hetta er bæði gott og neyðugt arbeiði - og tað er nokk at gera. Skal føroyskum verða lív lagað, má tað alla tíðina víðkast.

Tað skal gerast varliga – serliga tá tað snýr seg um nøvn, heiti og fakorð. Siðvenja skal virðast. Vit skulu ikki bara umseta fyri at umseta. Ikki bara vera øðrvísi fyri at vera øðrvísi. Og tá vit gera atlas, eiga geografar at hava líka stóra ávirkan sum málfrøðingar.

Men sanniliga er málið ikki "liðugt ment". Tað verður tað aldrin.

Tá Uni Arge til dømis tekur gittaran fram og fer at spæla og syngja, eitur hann á mannamunni ein "singer songwriter". Og farnu árini hevur verið skipað fyri "singer songwriter-kapping".

Klossutari verður tað neyvan...

Á sponskum siga tey elegant "cantautor" - sum er samansett av "cantante" (sangari) og "autor" (høvundur).

Her vantar okkum eitt snøgt, føroyskt heiti.

So latið okkum finna uppá eitt føroyskt heiti til Una og hansara líkar. Og latið okkum smíðað mong onnur, smidlig føroysk orð, har tørvur er á tí.

Men latið okkum sleppa tvangstankanum um hasar fimm bókstavirnar.

Tað styrkir ikki føroyskt at skriva Tansania, Simbabvi og Kili. Ella Bjørgvin og Danmørk. Tað bara ørkymlar. Og estetiskt sær tað út sum málsligt stakkalastás.



Richard Danielsen

# Forhangið sum skrædnaði

Í Matt. 27. kapitli lesa vit hetta:

Um níggjunda tíman rópti Jesus við harðari rødd: "Eli, Eli! Lama sabaktani?" - Tað er: "Gud Mín, Gud Mín! Hví ert Tú farin frá Mær?" v.46

Men Jesus rópti aftur við harðari rødd og gav upp andan. Tá skrædnaði forhangið í templinum í tvey, frá í erva líka niður ígjøgnum; jørðin skalv, og klettarnir klovnaðu; v.50-51.

Í 2. Mósebók kapitli 26 stendur:

Síðani skalt tú gera forhang av bláum, purpurreyðum og skarlaksreyðum tógvi og fínum, tvinnaðum líni; tað skal verða gjørt í listvevnaði, við kerúbum á. Tað skalt tú heingja á 4 gullklæddar stólpar av akasiuviði við gullkrókum á, og sum standa á 4 silvurstøbbum. So skalt tú heingja forhangið undir krókarnar. Innan fyri forhangið skalt tú seta vitnisburðarørkina, og forhangið skal vera tykkum til at skilja millum hitt heilaga og hitt alraheilagasta. V. 31-33

Í Mósebókunum lesa vit um heilagleika Guds. Lógin varð jú givin fyri at vísa okkum krøv Guds, tey eru ómetaliga strong. Gud hevur altíð vita, at menniskja kann ikki frelsast við lóg, tað var ikki tí, at hann gav jødunum lógina, hann visti, at teir vóru ikki førir fyri at halda hana. Men lógin vísir okkum strongu krøv Guds. Forskriftirnar um hvussu ísraelsmenn skuldu fara at í tabernaklinum, sum Móses reisti í oyðimørkini, og seinni í templinum, vísa okkum ómetaliga heilagleika Guds. Í 4. Mósebók 4. kapitli lesa vit um, hvussu farast skuldi at, tá ið tabernaklið skuldi flytast. Tá skuldu nakrir útvaldir menn, Kahatitar, ein ætt av ætt Levi, bera teir heiløgu lutirnar, men teir máttu ikki nema teir heiløgu lutirnar, heldur ikki hyggja at teimum. Prestarnir skuldu breiða útyvir alt, áðrenn Kahatitarnir komu at bera.

Gud opinberaði seg fyri Mósesi í tí alraheilagasta innan fyri forhangið. Inn hagar mátti ongin fara uttan høvuðspresturin einaferð um árið. Hetta vísir okkum, at vegurin til Gud er stongdur. Tað er ikki so, at vit fara soleiðis uttan víðari til hvíldar inn til Gud, tá ið vit doyggja. Jesus segði við Nikodemus, ein lærara í gudfrøði: "Tit mugu føðast av nýggjum!" Syndin má fáast av vegnum, áðrenn vit kunnu nærkast Gudi.

Tað er tí so undurfult og talandi, at forhangið í templinum skrædnar, tá ið Jesus doyr á krossinum fyri alla synd heimsins. Hetta var ein ræðulig løta fyri Harra og Frelsara okkara. Aftaná at verða píndur niður til evsta mark bæði likamliga og sálarliga upplivir Jesus, at Faðirin í Himli vendir sær burtur frá honum, og hann rópar hetta ræðuliga róp: Gud Mín. Gud Mín! Hví ert Tú farin frá Mær?

Eg nevndi, at syndin mátti fáast av vegnum. Tað er tað, sum hendir á krossinum, tá ið Jesus doyr. Bíblian sigur okkum allan vegin ígjøgnum frá um syndina. Serliga sterkt kemur tað fram í Esaias 24. kapitli, har vit lesa um dómin yvir jørðina, tað er álvarsamt at lesa. Tað stendur at enda,at jørðin skal sløðra sum hin drukni, at hon skal geva seg eins og vaktaraskýli. Hví? Jú, tí tungt liggur misbrot hennara á henni. Jóhannes sigur í fyrsta brævi sínum, at Jesus er bót fyri alla synd heimsins. Allur hesin ræðuligi dómur lá á Harranum Jesusi hesa løtuna á krossinum.

Vit síggja kanska onga aðrastaðni evangeliið so væl lýst sum hjá evangelistunum, tá ið teir siga frá krossfestingini og løtuni á krossinum. Lukas sigur, at annar ránsmaðurin kallar á Jesus, og Jesus gevur honum lyfti um, at teir skulu verða saman í Paradísi um eina løtu. Eftir hetta kemur myrkur yvir landið, og eisini kemur eitt ræðuligt myrkur yvir sál Harrans Jesusar. Hann, sum hevur lovað ránsmanninum, at teir skulu síggjast í Paradísi, missir nu sambandið við Gud og Himmalin, og Markus sigur okkum, at Jesus rópar hetta angistróp:"Gud Mín, Gud Mín! Hví ert tú farin frá mær?" Her kemur evangeliið so væl fram. Ein ránsmaður hongur har við djúpasta friði í hjartanum, meðan Frelsarin fer niður í eitt botnleyst myrkur fyri hann og okkum øll. Men áðrenn Jesus gevur upp andan, klárnar aftur fyri honum, hann sær nú skilliga, at verkið, sum hann var komin til jarðar at gera fyri okkum, er gjørt, og Jóhannes sigur, at hann rópar hetta sigursrópið: "Tað er fullgjørt!" Nú skrædnar forhangið frá í erva og líka niður ígjøgnum, tað vísir, at nú er ein opin vegur inn til Gud..

Paulus sigur í 2. Korintbr. 5. kapitli, at: "Í Kristusi samdi Gud heimin við seg sjálvan og tilroknar teimum ikki syndirnar. Øll heimsins synd varð tikin burtur, eisini mín og tín, sum lesur hetta. Paulus sigur víðari: "Vit er tá sendiboð í stað Kristusar... :"Verði sátt við Gud!"" Hetta ljóðar sum ein mótsøgn, men tað er tað ikki. Herí liggur tað, at takast má ímóti frelsuni. Hon er tín, ein gáva keypt dýrt við blóði Kristusar, men vilt tú ikki taka ímóti henni, so er hon ikki tín allíkavæl. Hebr. br. sigur: "Hvussu skulu vit tá sleppa undan, um vit skoyta ikki um so stóra frelsu!" Heb. 2,3.

Vilt tú taka ímóti hesi frelsu?